# Teir sterkastu menninir syr

**- Umborð hjá okkum vóru teir sterkastu menninir í lastini og stúvaðu sildatunnurnar. Hetta var eitt rættiliga tungt arbeiði. Sum tit síggja, eri eg ikki nakar Arnold Zwartsnegger, so tað vóru aðrir enn eg, sum høvdu hetta arbeiði. Men tunnurnar skuldu eisini rullast eftir dekkinum, og her plagdi eg at lyfta tær upp um forðingar við rullinum, tá ið skipið setti, segði Absalon Eliasen í áhugaverdari frásøgn um gomlu sildatíðina**

SILDATÍÐIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var ein væl upplagdur Absalon Eliasen, sum á hugnaløtu í skúlanum í Leirvík týskvøldið steig fram at røða um sildatíðina, soleiðis sum hann mintist hana.

Eingin turrislig og niðurskrivað framløga, ikki eitt pappír í hondini; alt úr minninum, og væl lá fyri, má sigast.

Tá ið Absalon helt, at nú hevði hann tosað nóg leingi, fór hann í innara lumma eftir einum lítlum pappíri fyri at vita, um hann hevði sagt alt, sum hann æltaði sær at siga hetta kvøldið.

Ein lágur maður, hábærsligur og hittinorðaður, men eisini álvarsamur og kensluborin um tað gamla og tey gomlu, sum undan fóru. Ein maður, sum prátar náttúrliga og dugir at fáa tey, sum lurta, við sær. Spyr, um hann heldur, at onkur annar minnist betur. Alt fellir náttúrliga, og hann kennir seg ikki sum tann, ið veit betur enn øll hini. Tí fellir tað, sum hann sigur og tað, sum onnur kundu skoyta uppí, so náttúrliga.

Tað var Bókasavnsnevndin hjá Leirvíkar kommunu, sum skipaði fyri tiltakinum týskvøldið. Tey høvdu heitt á Absalon Eliasen, sum hevur sínar røtur í Leirvík, um at greiða frá um sildatíðina, tarvar og tarvahald í Leirvík.

Nógv fólk var komið saman í stóru skúlastovuni, stovu 5, í Leirvíkar skúla at lýða á.

Tá ið skipað verður fyri ymiskum tiltøkum í Leirvík, sum nerta við søgu, mentan ella serstakar dagar er vanligt at leita upp fólk, sum hava sínar røtur í bygdini, men sum hava búð aðrastaðni í mong ár.

Leirvíkin eigur nógv slík fólk, sum hava sína søgu at siga – og framvegis hava sítt hjartað í bygdini, hóast lívsleiðin førdi tey aðrastaðni.





*- Tann eina dagin brotnaði rúturin í skeilettinum. Glasið fór í sor, og beint undir niðri í kabússini stóð kokkurin og elti breyð. Glasið fór niður deiggið. Kokkurin tók tað ringasta burtur úr aftur og elti síðan víðari. Eingin fekk skaða av hesum, segði Absalon Eliasen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Sildatíðin

Absalon veit nógv um sildatíðina at siga, hóast hann var blaðungur maður tíðliga í fimtiárunum, og hóast hann longu sum unglingi flutti av bygdini.

Í frásøgnini nevndi hann stóru broytingina, sum hevur verið í hansara tíð og mintist, tá ið ljós bert var í Turkihúsinum og kaihúsinum í bygdini.

- Tað vóru ringar tíðir í Føroyum seinast í fýratiárunum og í fimtiárunum. Føroyingar vóru móttleysir og høvdu ilt við at síggja, hvussu komast kundi undan aftur kreppuni. Men í Leirvík var ikki so illa vorðið sum nógva aðrastaðni í landinum.

Eins og í dag, átti Leirvíksbygd eisini tá í tíðini framtakshugað fólk, sum dugdu at skapa bygdini eina framtíð og fólkinum livibreyð.

Absalon vísti til eina grein í Dimmalætting um hetta mundið, sum gamli blaðstjórin nevndi, "Lys i mørke".

- Í greinini skrivaði hann um "en levedygtig fiskeflåde", og tað var leirvíksbygd og skipini, ið hoyrdu til bygdina, sum blaðstjórin sipaði til, segði hann.

Búskaparliga støðan í landinum var so soleiðis vorðin, at trupult var at fáa nakran at fíggja skipakeyp og líka so lítið skiparakstur.

Hann nevndi, at skip varð selt til tess at útvega eginpening til Turkihúsið, sum saman við skipunum á staðnum fekk so stóran týdning fyri bygdina.

- Í dag verður tú biðin um at skriva undir, áðrenn tú hevur vent tær ein hálvan "umdreining" í einum banka, legði hann aftrat.

Sum smádrongur mintist Absalon eini 12 skip og bátar, tá ið talið var størst. Hann nevndi tey fyrstu skipini, hann mintist í bygdini og greiddi frá gongdini, meðan hann vaks upp - og til hann sjálvur fór til skips sum stórur smádrongur fyri hálvan part, og í fyrsta umfari sigldi árini fram til 1957.

## Tungt arbeiði

Hegnisliga greiddi Absalon frá, hvussu sildaskipini vóru riggaði, tá ið tann tíðin byrjaði, og hann greiddi frá arbeiðnum umborð, sum mangan var tungt og strævið - við gørnum, trossum, søkkum, tunnuhjalli til tómar tunnur og tungum sildatunnum, sum skuldu stáplast í lastini og á dekkinum, tá ið lastin var full undir lúkurnar.

- Umborð hjá okkum var tað soleiðis, at teir sterkastu menninir vóru í lastini og stúvaðu sildatunnunur. Hetta var eitt rættiliga tungt arbeiði. Sum tit síggja, eri eg ikki nakar Arnold